# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útjavning

Flestu av okkara grannalondum hava eina ella aðra skipan, har tað við lóg verður javnað búskaparliga millum kommunurnar. Einfalt talað merkir hetta, at tikið verður frá ríkum kommunum og latið kommunum við veikari inntøkustøði. Hesin spurningur hevur so av og á verið umrøddur í Føroyum, men higartil er einki ítøkiligt komið burturúr. Orsøkin man ivaleyst vera, at her er talan um ein politiskt sera eyman spurning, har sterk lokaláhugamál gera seg galdandi. Búskaparráðið ger vart við, at fortreytin fyri einum skilagóðum uppgávu- og arbeiðsbýti millum land og kommunur er, at kommunurnar gerast nógv færri í tali. Ráðið sigur, at skulu kommunurnar kunna átaka sær fleiri uppgávur, sum yvirhøvur eru vanligar fyri kommunur, er neyvan rúm fyri fleiri enn 4-7 kommunum. Búskaparráðið undirstrikar sostatt, at um føroyingar ynskja ein búskaparliga skynsaman kommunalan sektor, so er tað ein avgjørd fyritreyt, at kommunurnar gerast væl færri í tali, og at ein millumkommunal útjavning verður skipað. Hetta er greið tala, sum gevur okkum øllum nakað at hugsa um.

Tilmælini eru meira principiel enn ítøkilig. Skipanin skal javna út munirnar í skattagrundarlagnum. Við sama skattaprosenti ger útjavningin kommunurnar førar fyri at ráða yvir somu skattainntøku fyri hvønn íbúgva. Hinumegin verður gjørd ein útjavning, soleiðis at kommunurnar á nærri ásettum økjum – so sum barnaansing, skúlaverk og eldrarøkt – gerast førar fyri at bjóða sínum borgarum somu tænastu. Tað er ikki ein fyritreyt, at kommunurnar hava sama skattaprosent, eins og tað heldur ikki er nøkur fyritreyt, at kommunurnar veita sínum borgarum somu tænastu. Men, sigur ráðið, skipanin gevur kommununum møguleika at brúka útvið sama skattaprosent, eins og skipanin gevur kommunum møguleikan at bjóða sínum borgarum á leið somu tænastu. Búskaparráðið nevnir eisini, at hóast tað eru borgararnir, sum tá ið samanum kemur gjalda eina millumkommunala útjavningarskipan, so ber hon einans við sær eina útjavning millum kommunurnar – ikki ímillum borgararnar. Hetta merkir, at eftir eina millumkommunala útjavning fer tað millum kommunur framvegis at vera stórur munur í inntøkuni eftir skatt í miðal fyri hvønn íbúgva. Nú hevur so Búskaparráðið tikið um notuleggin og nú slepst ikki undan at taka eitt álvarsamt orðaskifti og støðu til spurningin um eina kommunal útjavningarskipan. Eingin orsøk er tó til at leypa framav, men heldur at umrøða hetta mál væl og virðiliga í kommununum, teimum kommunalu felagskapunum og sjálvsagt á Føroya løgtingi. Frágreiðingin er komin í tøkum tíma og hevur uppiborið eina seriøsa viðgerð av frá øllum avvarandi pørtum.

**Sosialurin**

## Ársins diplomatur?

**HERI MOHR**



”Tryggari grundarlag undir góðum sjúkrahúsverki”. Soleiðis eitur áhugaverdur kronikkur, sum landsstýrismaðurin við heilsumálum, Hans Pauli Strøm, skrivaði fyri nøkrum døgum síðani.

”Tað er sera álvarsamt, at farið er so nógv út um játtanina á øllum sjúkrahúsunum í 2007.”, er niðurstøðan, sum landsstýrismaðurin innleiðir kronikkin við. Men í sama andadrátti sigur hann, at tann politiski myndugleikin skal tryggja, ”at haldgott fíggjarligt grundarlag verður lagt fyri rakstrinum”.

Í kronikkinum lesa vit eisini, at fortreytirnar fyri, at sjúkrahúsverkið verður rikið effektivt og rationelt, eru, ”at sjúkrahúsverkið hevur eina nøktandi játtan, tvs. at samsvar er millum játtan og kostnaðin av teim tænastum, ið verða kravdar av starvsfólkum og leiðslu á sjúkrahúsunum”.

Hetta er veruliga kjarnin í tí annars sera drúgva kronikki, nevniliga hetta: samsvar millum krøv frá sjúkrahúsleiðslunum og peningajáttan frá løgtinginum.

Sum kunnugt verða okkara sjúkrahús fíggjað við helvtarbýti millum landskassan og ríkiskassan, meðan statskassin rindar allan kostnaðin til serviðgerðir á ríkishospitalinum.

Hetta fíggjarøkið varð væl og virðiliga handhevjað og umsitið av landsstýrisins umsiting til 1. januar 1988, tá ríkiskassans partar fóru í tann so nógv umrødda blokkin.

Samsvarandi lógum varð blokkurin regluliga dagførdur (prístal v.m.) eina ferð um árið frá 1. januar 1988 til 31. december 2001, tá landsstýrið gav tí donsku stjórnini boð um, at dagføringin skuldi halda uppat og blokkurin í síni heild fyribils (5 ár) niðurfrystast. Í hesari niðurfrysting eru m.a. 50 milliónir, sum serviðgerðir á Ríkishospitalinum kostaðu í 2001. Í 2006 kostaðu serviðgerðirnar 75 milliónir, ella 25 milliónir meira enn tað, ið landskassin ráddi yvir í ”djúpfrystaranum” til sama endamál.

Ein onnur avleiðing av niðurfrystingini er, at okkara sjúkrahús síðan 2002 hava havt milliónа yvirtrekk orsakað av tørvandi fígging. Tá landsstýrismaðurin heldur seg til 2007, so kann tað vera villleiðandi. Orsøkin til áhaldandi hall uppstóð 1. januar 2002.

Í árunum 1996-2001 (6 ár) varð ríkiskassans partur til rakstur av okkara sjúkrahúsverki dagførdur, øktur við 11%.

Í næstu 6 árini, 2002-2007, hevur ríkiskassans partur, 283.6 milliónir, verið djúpfrystur sum sagt eftir boðum úr landsstýrinum. Um hetta ikki hevði verið gjørt, hevði ríkiskassans partur við hækking javnt við dagføringini tey 6 árini 97/01 nú verið øktur við umleið 30 milliónum um árið svarandi so nøkulunda til rakstrarhall sjúkrahúsanna, sum vit lesa um í kronikkinum.

Børn, kring í lítlutabell, duga at rokna út, at leiðslurnar á okkara sjúkrahúsum ikki høvdu farið út um játtanina, um javnvág var millum heilsurøktarkrøv, sum nútíðin setur, og lógbundnu fíggingar, sum vóru í góðum hondum til 1. januar 2002.

Spurningurin er tessvegna, um landsstýrismaðurin við heilsumálum, Hans Pauli Strøm, tekur neyðug stig til at fáa ríkiskassans part av rakstrarkostnaði sjúkrahúsanna dagførdan samsvarandi galdandi lógum og á hendan hátt aftur fær ”tryggari grundarlag undir góðum sjúkrahúsverki”. ?

Skattaborgararnir, starvsfólkið í heilsuverkinum og verandi og komandi sjúklingar hava rímiligt krav um at fáa hetta at vita.

Umframt Heilsuverkið umsitur Hans Pauli Strøm eisini Almannaverkið ella sagt við øðrum orðum: við hesum báðum bleytu-virðiøkjum um hendi umsitur Strøm næstan ta hálvu fíggjarlógina. Tað sigur ikki so lítið.

Eins og blokkurin til Heilsuverkið fór eisini blokkurin til Almannaverkið – 330 milliónir – í djúpfrystaran tann 1. januar 2002. Um hesin blokkur kundi komið úr kuldanum og verið dagførdur (tó ikki afturvirkandi), við 11%, øktist hann við 36 milliónum. Samanlagt hevði landsstýrismaðurin tá fingið tiltrongdar 65 til 70 milliónir meira at rátt yvir til Heilsuverkið og Almannaverkið.

Samanumtikið má staðfestast, at eingin fígging í tí almenna húsarhaldinum er niðurfryst uttan fíggingin til sjúkrarøkt, almennar pensiónir og serforsorg. Hetta má haldast at vera ósømiligt og óverdigt hjá framkomnum fólki.

Á floksfundi hjá Sjálvstýrisflokkinum segði løgtingsmaðurin Kári á Rógvi, at hann vildi ”plaffa” onkran niður, so tey bleytu virðini kunnu verða vard, tá ið fíggjarlógin 2008 kom til viðgerðar í løgtinginum. Hvør kann ímynda sær løgtingsmannin sum ein annan Lucky Luke við eftirgjørdum 6 skota revolvara frá BR fyri 199.99 kr. skræða skræðu av vilstum sjeriffum og nøkrum Daltons? Hesi, sum undir skræðuni eru bæði fitt og skilagóð. Men, um Kári á Rógvi við ”plaffing” megnar at taka teir her umrøddu blokkarnar úr kuldanum og harvið fáa fíggingina til Heilsu-og Almannaverkið aftur á rættkjøl og í virðiliga legu við støði í galdandi lógum og reglum og á tann hátt verja tey bleytu virðini, ja, so eigur hann við hesi vælgerð og politiskum dugnaskapi at verða tilnevndur *Ársins Diplomatur*.

**PS**. Upphæddirnar í greinini eru fingnar úr landskassans almennu ársroknskapum, og út frá teimum eru metingar gjørdar. Um okkurt av hesum er villleiðandi ella beinleiðis skeivt, verður tað vónandi rættað av fólki við neyðugari vitan um tað, sum her er skrivað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.